VINNUMÁLARÁÐIÐ
INNANLANDS

Tórshavn, tann 12. juli 2010
J.Nr.: 10/00340-2
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: jd

**Fylgiskriv til (uppskot til) Kunngerð um løggilding og skráseting av matvøruvirkjum**

Við hesum verður uppskot til *Kunngerð um løggilding og skráseting av matvøruvirkjum* send til hoyringar. Freistin at gera viðmerkingar er sett til **20. august 2010**.

*Um uppskotið:*
Uppskotið til *Kunngerð um løggilding og skráseting av matvøruvirkjum* broytir ikki munandi tær reglur, sum higartil hava verið galdandi eftir matvørulógini frá 1985 (Løgtingslóg nr. 46 frá 21. juni 1985 um matvørur v.m.).

Í matvørulógin frá 1985 var beinleiðis ásett, hvussu farast skuldi fram, tá Heilsufrøðiliga starvsstovan veitti góðkenning og tilmelding av matvøruvirksemi. Í nýggju matvørulógini (Løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010 um matvørur v.m.) er farið burtur frá hugtøkunum *góðkenning* og *tilmelding* og í staðin verða nýtt hugtøkini *løggilding* og *skráseting*. Samstundis er heimildin at áseta neyvari reglur flutt landsstýrismanninum.

Í útgangsstøði er tó eingin innihaldslig broyting ætlað í mun til tær reglur, sum vóru galdandi frammanundan.

Vinarliga vegna Vinnumálaráðið

Jóanna Djurhuus
ráðgevi

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 60 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: VMR@VMR.FO

(Uppskot til)

# Kunngerð

## um

## løggilding og skráseting av matvøruvirkjum

Við heimild í § 26, § 27, § 29, stk. 1, § 30, § 32, stk. 1, § 32, stk. 2, § 34, § 35, stk. 1 og 3, § 46, § 52, stk. 4, og § 58, stk. 4-5, í løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010 um matvørur v.m., verður ásett:

### 1. kapittul
### Øki og allýsingar

**§ 1.** Hendan kunngerð fevnir um løggilding og skráseting av matvøruvirkjum v.m., jvb. tó stk. 2.
*Stk. 2.* Undantikið er virksemi, sum fevnir um viðgerð, keyp og sølu av fiski og fiskavørum á landi og virksemi, sum fer fram á fiskiførum.

**§ 2.** Um ikki annað er ásett í hesi kunngerð eru allýsingar í ES fyriskipan nr. 178/2002 frá 28. januar 2002 um meginreglur og krøv í matvørulóggávu galdandi.

**§ 3.** Eftir kunngerðini er at skilja:
1) Matvøruvirki: Eitt og hvørt virki, alment ella privat, sum við ella uttan vinningi fyri eyga, fæst við eitt og hvørt virksemi, sum er partur av einum og hvørjum liði í framleiðslu, hagreiðing ella veitan av matvøru.
2) Hagreiðing: Ein og hvør handfaran av matvøru, sum hevur við sær eina broyting av matvøruni, t.d. frysting, hitaviðgerð ella útskering.
3) Veitan: Ein og hvør søla, latan, flutningur og útflýggjan av matvørum ella fóðri, líkamikið um hetta fer fram við vinningi fyri eyga ella ikki.
4) Smásøla: Ein og hvør hagreiðing, viðgerð og goymsla av matvørum á tí staði, tær verða veittar til endabrúkaran, undir hesum eisini matstovur, virkismatstovur, stovnskøkar og aðrar matarveitingarskipanir, umframt handlar, útbýtingarstøðir og heilsølur.
5) Matvørur, sum spillast skjótt: Matvørur, sum eftir stutta goymslu í stovuhita byrja at fáa útsjónd, lukt ella smakk, sum víkir frá, ella sum kunnu gerast gróðrarlendi fyri framvøkstri av sjúkuelvandi mikroorganismum til eitt støði, ið kann vera heilsuskaðiligt.

### 2. kapittul
### Løggilding av matvøruvirkjum

**§ 4.** Matvøruvirki, sum hevur til endamáls at veita matvørur til eitt annað matvøruvirki, kann byrja, tá løggilding er fingin til hetta virksemi frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

**§ 5.** Smásøluvirki, ið fevnir um sølu ella viðgerð av matvørum, og heilsøluvirki, ið fevnir um sølu, goyming, áfylling, pakking, umpakking ella flutning av matvørum, kann byrja, tá løggilding er fingin til hetta virksemi frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.
*Stk. 2.* Tað sama er galdandi fyri sølu av matvørum á gistingarhúsum, matstovum og fyri virkismatstovur og stovnskøkar við fleiri enn 12 føstum kostgangarum, og fyri høli, ið verða leigað út til matgerð og/ella borðreiðing.

**§ 6.** Hagreiðing av matvørum, sum fer fram á øðrum staði enn tí øki, har vørurnar verða veittar endabrúkaranum, kann verða løggildað sambært § 5, um veitingin fer fram frá einum einstøkum føstum ella koyrandi sølustaði, og

um hagreiðingin og veitingin verður fyriskipað av sama eigara ella brúkara.

**§ 7.** Matvøruvirki mugu ikki, uttan serligt loyvi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, takast við annað virksemi enn tað, sum løggildingin fevnir um.
*Stk. 2.* Høli, amboð og innbúgv mugu bert nýtast til tað virksemi, sum løggildingin fevnir um. Heilsufrøðiliga starvsstovan kann tó í serligum førum loyva, at høli, amboð og innbúgv verða nýtt til virking av øðrum matvørum, antin samstundis ella tá vanliga virksemi ikki fer fram.

## 3. kapittul
## Skráseting av matvøruvirkjum

**§ 8.** Niðanfyrinevnda virksemi, sum hevur til endamáls at veita matvørur til onnur virki, kann byrja, tá matvøruvirkið hevur fingið váttan um, at matvøruvirkið er skrásett hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni:

1) Virki, sum einans takast við at goyma, flyta ella veita matvøru, sum ikki spillist skjótt, og
2) virki, sum einans takast við at veita matvøru, uttan at henda matvøra verður goymd á virkinum.

**§ 9.** Niðanfyrinevnda virksemi, sum hevur til endamáls at veita matvørur í smásølu, kann byrja, tá matvøruvirkið hevur fingið váttan um, at matvøruvirkið er skrásett hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni:

1) Avmarkað hagreiðing av matvøru, t.d. at skera sundur breyð, køkur, frukt og grønmeti, mala kaffibønir o.tíl., um ikki heilsufrøðiligir trupulleikar eru tengdir at hesum virksemi,
2) hagreiðing ella veitan av matvørum, ið ikki spillast skjótt,
3) goymsla, flutningur ella veitan av matvørum, sum spillast skjótt, um matvøran er pakkað á hóskandi hátt, og
4) virksemi, sum bert fevnir um veitan av matvørum, og ikki um goymslu av matvørum.

**§ 10.** Matvøruvirki mugu ikki, uttan serligt loyvi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, takast við annað virksemi enn tað, sum skrásetingin fevnir um.
*Stk. 2.* Høli, amboð og innbúgv mugu bert nýtast til tað virksemi, sum skrásetingin fevnir um. Heilsufrøðiliga starvsstovan kann tó í serligum førum loyva, at høli, amboð og innbúgv verða nýtt til virking av øðrum matvørum, antin samstundis ella tá vanliga virksemi ikki fer fram.

## 4. kapittul
## Skráseting av serligum virksemi

**§ 11.** Innflutningur av matvørum frá samhandilslondum ella triðjalondum við veitan sum endamáli kann bert verða framdur av virkjum, sum eru løggildað ella skrásett sambært §§ 4-10.
*Stk. 2.* Innflutningur eftir stk. 1 kann byrja, tá virkið er ávikavist løggildað av ella skrásett hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, og virkið hevur fingið fráboðan um hetta.

## 5. kapittul
## Virksemi, sum er undantikið løggilding og skráseting

**§ 12.** Niðanfyrinevnda virksemi, sum hevur til endamáls at veita vøru beinleiðis til endabrúkaran, skulu ikki verða løggildað ella skrásett, um ikki heilsufrøðiligir trupulleikar eru tengdir at hesi hagreiðing:

1) Veitan av føroyskum seyða- og neytakjøti við durasølu til endabrúkaran,
2) veitan av matvøru til vitjandi í privata húsarhaldinum *(Heimablídni)*,
3) veitan av morgunmati í sambandi við *Ból og Bita* í privata húsarhaldinum, og
4) hissini søla av matvørum, sum bert er fyribils, ella sum bert fer fram til

serlig høvi, t.d. í sambandi við stevnur, framsýningar og lýsingarátøk.

## 6. kapittul
## Umsókn og treytir fyri løggilding og skráseting

**§ 13.** Skrivlig umsókn um løggilding verður latin Heilsufrøðiligu starvsstovuni á serligum oyðublað. Virkir, sum søkja um løggilding, skulu saman við umsóknini lata starvsstovuni eitt avrit av innaneftirlitshandbókini, umframt allar neyðugar upplýsingar.
*Stk. 2.* Eitt virki, sum fevnir um fleiri framleiðslueindir ella bygningar, sum, orsakað av landafrøðiligari frástøðu, ikki natúrliga eru samanhangandi, skal søkja um løggilding fyri hvørja einstaka framleiðslueind ella bygning.
*Stk. 3.* Løggildingartreytirnar kunnu áseta, at virkið fyri egnan kostnað skal lata gera bakteriologiskt og kemiskt eftirlit ella annað rakstrareftirlit við teimum vørum, ið verða hagreiddar og veittar, og eftirlit við reinførisviðurskiftunum á virkinum.
*Stk. 4.* Heilsufrøðiliga starvsstovan boðar skrivliga frá, um løggilding verður givin. Um neyðugt, inniheldur løggildingin serlig krøv, t.d. viðvíkjandi innrætting, framleiðsluslagi og –nøgd.
*Stk. 5.* Virkinum verður tillutað eitt løggildingarnummar, og skal øll vøra, sum verður veitt frá hesum virki, vera merkt við antin løggildingarnummarinum ella atstaði virkisins.

**§ 14.** Umsókn um skráseting skal verða send Heilsufrøðiligu starvsstovuni á serligum oyðublað. Virkir, sum søkja um skráseting, skulu saman við umsóknini lata starvsstovuni allar neyðugar upplýsingar.
*Stk. 2.* Eitt virki, sum fevnir um fleiri framleiðslueindir ella bygningar, sum, orsakað av landafrøðiligari frástøðu, ikki natúrliga eru samanhangandi, skal søkja um skráseting fyri hvørja einstaka framleiðslueind ella bygning.

## 7. kapittul
## Endurnýggjan og afturtøka av løggilding ella skráseting

**§ 15.** í hesum førum skal søkjast um nýggja løggilding:
1) um munandi broytingar verða framdar av løggildaðu bygningunum,
2) um munandi broytingar verða framdar í innrættingini av virkinum, og
3) um munandi broytingar verða framdar í framleiðsluhátti ella vøruúrvali.

**§ 16.** Eigaraskifti á virki, sum er løggildað ella skrásett, skal í seinasta lagi yvirtøkudagin, fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
Stk. 2. Fráboðanin skal innihalda upplýsing um, um nýggi eigarin ynskir nýggja løggilding.

**§ 17.** Heilufrøðiliga starvsstovan kann viðgera eina løggilding av nýggjum, tá fimm ár eru liðin síðani løggilding var givin.

**§ 18.** Heilsufrøðiliga starvsstovan kann taka aftur eina løggilding ella strika eina skráseting ella geva boð um, at raksturin skal steðga, um so er, at:
1) virkið ikki longur lýkur treytirnar fyri løggilding ella skráseting,
2) grundarlagið undir løggildingini ella skrásetingini broytist munandi, ella
3) eini boð ella forboð frá Heilsufrøðiligu starvstovuni ikki verða fylgd.

*Stk. 2.* Afturtøka av løggilding ella striking av skráseting hevur virknað frá tí, at avgerðin um afturtøku ella striking er fráboðað virkinum, um ikki annað er ásett í aðrari lóggávu ella í avgerðini.
*Stk. 3.* Í sambandi við endurnýggjan av eini løggilding ella skráseting, sum er tikin aftur av Heilsufrøðiligu starvsstovuni, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan áseta serliga treytir, sum eru grundaðar á virkisraksturin o.a. frammanundan afturtøkuni ella strikingini.

## 8. kapittul
## Krøv til innaneftirlitsstarvsstovur

**§ 19.** Sýni, sum verða tikin sum liður í innaneftirliti virkisins, skulu verða kannað á eini starvsstovu, sum hevur eina skjalfesta góðskuskipan, sum er grundað á akkreditering, góðkenning ella á eina góðskuskipan, sum er grundað á viðurkendar meginreglur innan góðskutrygging av starvsstovum.

## 9. kapittul
## Revsiásetingar og gildiskoma

**§ 20.** Um ikki hægri revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, verður við bót revsaður tann, sum

1) ikki heldur ásetingarnar í §§ 4, 5, 6, 7, 8, 9, 10 og 11, § 13, stk. 5, § 15 og § 19, ella
2) ikki lýkur treytirnar í § 13, stk. 1-4, og § 14.

*Stk. 2.* Revsingin, ásett í stk. 1, kann verða herd til fongsul í upp til 2 ár, um gerðin ella undanlátið er framt tilætlað ella av grovum ósketni, og um henda gerð ella undanlát hevur havt við sær

1) fólkaskaða ella vanda fyri fólkaskaða, ella
2) fíggjarligan vinning, ella ætlan um fíggjarligan vinning, fyri viðkomandi sjálvan ella onnur.

*Stk. 3.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

**§ 21.** Verður eitt brot ikki mett at hava við sær harðari revsing enn bót, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan boða frá, at málið kann verða gjørt av uttan rættarsókn, um tann, sum hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar innan eina nærri ásetta freist, ið eftir umsókn kann verða longd, at rinda eina í fráboðanini ásetta bót.

**§ 22.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 12. juli 2010

Johan Dahl
landsstýrismaður

/Arne Poulsen